## VEÐRIÐ




**Veðrið fríggjadagin**
Sunna, 10 til 13 m/s. Yvirskýggjað og támut, regn av og á. Hitin um 8 stig.




**Veðrið leygardagin**
Sunnan, 5 til 10 m/s, og skýggjað og támut veður við regni av og á. Út á dagin snarar hann í ein vestan, og hann klárar í, tó við ælaveðri. Hitin millum 5 og 9 stig.




**Veðrið tollaksmessudag**
Útsynningur og sunnar, sum út á dagin veksur til storm, 18 til 23 m/s. Yvirskýggjað við regni. Seinni klárar hann í, tó við ælaveðri og hann snarar í ein útsynning, og minkar síðani niður í 13 til 18 m/s. Hitin millum 5 og 9 stig.

**Veðrið jólaaftan**
Hann minkar vindin av vestri og útsynningi, 10 til 15 m/s. Skiftandi skýloft við ælaveðri. hitin millum 5 og 8 stig.



*Sangkórið Tarira, undir leiðslu av Sunleifi Rasmussen, fer millum annað at framføra verk eftir kenda tónaskaldinum, Johan Sebastian Bach (1685-1750)*

# Jólakonsert við Tarira

**KÓRSANGUR**
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

»O Magnum Misterium« kallast konsert, sum kórið Tarira undir leiðslu av Sunleifi Rasmussen, framførir í Christianskirkjuni og Hoyvíkar Kirkju fríggjadagin og leygardagin.

Verkið er eftir stóra renessansutónaskaldinum William Byrd (1543-1623) og snýr seg um Jesu føðing. Byrd var katolikkur, meðan heimlandið var protestantiskt. Hóast henda støðan kravdi varni, megnaði hann alt lívið at standa seg væl við enska drottningavaldið, samstundis sum hann helt á við at skriva latínskan andaligan tónleik, sum ikki kundi framførast alment, men sum bert varð framførdur heima hjá fólki.

William Byrd verður av mongum mettur sum eitt tað besta enska tónaskaldið frá sein-renessansuni, sum fekk alstóran týdning fyri framtíðar tónleikin í Onglandi, Týsklandi, Hollandi og Belgia. Byrd var annars næmingur hjá Thomas Tallis, sum kórið Tarira hevur havt á skránni á fleiri konsertum. Kórið Tarira hevur saman við kórleiðaranum, Sunleif Rasmussen, havt eitt sera spennandi ár við nógvum framførslum og fløguupptøkum, sum verða at hoyra, tá fløgan kemur út í vár. 2007 var eisini árið, tá kórinum varð sýndur tann stóri heiður at verða tilnevnt til tónleikaheiðursløn norðurlandaráðsins, sum svenska kamarkórið hjá Eric Ericsson endaði við at vinna fram um 11 onnur norðurlendsk kór.

Tarira fer eisini at framføra verk eftir Johan Sebastian Bach og fleiri nýggjar útsetingar hjá Sunleifi Rasmussen av jólaløgum hjá Hans Jacobi Højgaard.

Konsertin í Klaksvík fríggjadagin byrjar klokkan 19.30, meðan konsertin leygardagin í Hoyvík verður klokkan 16.00

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 5 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 4 |
| Róm | -- |
| Malorca | 10 |
| Athen | 9 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 1 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ





**Veðurlagið**
Eitt lágtrýst við Danmarkarsundið ferðast í ein landnyrðing. Eitt annað lágtrýst á 45 stigum norður og 30 stigum vestur í Atlantshavinum, ferðast seg í ein útnyrðing, og kemur í dag fram við Tasiilaq. Tilhoyrandi brúgvaløg nærkast vestaneftir fríggjanáttina, samstundis sum lýggj luft streymar yvir Føroyar av útsynningi.
Eitt hátrýst yvir Norðsjógvin ferðast spakuliga í ein landsynning. Fríggjadagin liggur ein kuldabrúgv beint vestanfyri Føroyar og fer leygardagin eystureftir. Sunnudagin kemur eitt djúpt lágtrýst við Eysturísland úr útsynningi, og tilhoyrandi brúgvaløg fara framvið Føroyum tollaksmessudag.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰ – 17/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í desember: -7,2° - Mesti hiti máldur í desember: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰ – 17/12. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 99 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

**Hósdag 20. Desember kl. 20.00**
*Hólmgonga um átrúnað og politikk*

**Miðlagarðurin mikudag 19. desember frá kl.16.00**
*Forex framsýning*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

17. des. Fyrra kvarter
22. des. Mánin næstur jørðini
24. des. Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. Des | 02.43 | 15.08 | 01.43 | 14.08 | 01.58 | 14.23 | 04.43 | 17.08 | 05.43 | 18.08 | 00.58 | 13.23 | - | 12.23 | 02.58 | 15.23 | 03.58 | 16.23 | 02.28 | 14.53 | 03.43 | 16.08 |
| 21. Des | 03.33 | 16.00 | 02.33 | 15.00 | 02.48 | 15.15 | 05.33 | 18.00 | 06.33 | 19.00 | 01.48 | 14.15 | 00.48 | 13.15 | 03.48 | 16.15 | 04.48 | 17.15 | 03.18 | 15.45 | 04.33 | 17.00 |
| 22. Des | 04.27 | 16.56 | 03.27 | 15.56 | 03.42 | 16.11 | 06.27 | 18.56 | 07.27 | 19.56 | 02.42 | 15.11 | 01.42 | 14.11 | 04.42 | 17.11 | 05.42 | 18.11 | 04.12 | 16.41 | 05.27 | 17.56 |
| 23. Des | 05.26 | 17.56 | 04.26 | 16.56 | 04.41 | 17.11 | 07.26 | 19.56 | 08.26 | 20.56 | 03.41 | 16.11 | 02.41 | 15.11 | 05.41 | 18.11 | 06.41 | 19.11 | 05.11 | 17.41 | 06.26 | 18.56 |
| 24. Des | 06.26 | 18.56 | 05.26 | 17.56 | 05.41 | 18.11 | 08.26 | 20.56 | 09.26 | 21.56 | 04.41 | 17.11 | 03.41 | 16.11 | 06.41 | 19.11 | 07.41 | 20.11 | 06.11 | 18.41 | 07.26 | 19.56 |